## DAGSINS MEINING

# Stórur dagur fyri alt Føroya fólk

Skulu vit ganga eftir tí kós, sum okkara politikarar hava sett sær við at útbyggja samferðslunetið í landinum, má sigast, at tað eru góðar tíðír í Føroyum, og at mett verður, at hesar fara at halda fram tey komandi árini eisini. Tí hvat land við einans 47.000 íbúgvum er ført fyri eftir fáum árum at byggja ikki færri enn tveir undirsjóvartunlar, ein vanligan tunnil og síðani eisini at gera íløgur í nýtímans Suðuroyarskip og samferðsluhavnir!

Her kunnu vit av sonnum sanna orðafellið um, at tað grør um gangandi fót. Hóast føroyingar eru ymiskir á máli, tá tað ræður um mong samfelagslig og politisk mál, so tykist vera breið semja um at betra um samferðslukervið sum heild. Dagurin í dag er rættiliga søguligur, nú tað verður skotið ígjøgnum undir Vestmannasundi. “Koyrandi” er í fyrsta undirsjóvartunlinum í Føroyum. Og er hetta í sær sjálvum bæði ein stórhending og eitt bragd. Ikki tí at vit við hesum hava uppfunnið djúpa borðiskin av nýggjum, men tí at ein so fáment tjóð megnar at gjøgnumføra eitt so stórt og krevjandi arbeiði tað verið seg peningaliga og byggiliga. Vit vilja við hesum ynskja øllum teimum, sum hava gjørt hetta møguligt, tillukku og góðan byr.

Hetta er nakað, sum alt Føroya fólk eigur æruna av, og gleðast vit um, at skjøtilin er settur á at gera undirsjóvartunnil millum Lorvík og Klaksvík. Men tá farið verður undir so stórt og krevjandi arbeiði sum tunnil til Klaksvíkar, eigur hetta ikki at verða skundað ígjøgnum bara tí at hetta skal “brúkast” politiskt. Fyrireikingararbeiðið má vera 100% og tað merkir, at spurningurin er ikki at fáa áfast millum Eysturoynna og Norðoyggjar sum skjótast, men at hetta verður gjørt á rættan og besta hátt. Vit hava alt ov mong dømi um í føroyskari samferðslu-søgu, at politisku ynskiniog lyftini hava yvirhálað skil og realismu. Har avgerðir um útbyggingar eru skundaðar ígjøgnum uttan ta neyðugu og nóg gjølligu fyrireikingina.

Vit fegnast um, at okkara samferðslukervi er so væl útbygt. Hetta er ein av høvuðslívæðrunum í okkara oyggjasamfelag og ein av fortreytunum fyri trvinaði og menning kring alt landið. Hetta er eisini í tráð við tann útoyggjapolitikk, sum lunnar eru lagdir undir. Men tá farið verður undir risastórar íløgur mugu vit tryggja okkum, at tær skilabestu loysnirnar verða valdar. Tí skal tað vera vón okkara, at allir møguleikar verða vendir og kannaðir, áðrenn sett verður á undirsjóvartunnilin undir Lorvíksfjørð. Undirsjóvartunnilin, sum nú knýtir Streymoynna og Vágoynna saman er eitt nýtt kapittul í føroyskari søgu. Vónandi fer hann at verða okkum øllum til gagns. Tillukku við úrslitinum higartil.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til Ásbjørn Lómaklett, skúlastjóra

**Eyðólv Dimon**



Nú er tað so, at ongin noyðist at gera meg varugan við, hvat stendur í bløðunum, og at tú hevur skrivað eina rættleiðing til mín í Sosialin nr.4-2002. Eg ávaraði í míni grein ímóti ætlanunum hjá Landsstýrinum at leggja skúlarnar út til kommunurnar, tí kvaliteturin tá fór at gerast sera óeins í ymsu skúlunum í Føroyum. Hetta síggi eg sum ein hóttan móti fólkaskúlanum, sum hevur havt sum aðalmál at geva føroysku næmingunum somu byrjan ella grund at fara víðari við í lívinum. Sum eitt ræðandi dømi tók eg fram, at næststørsta kommuna í landinum ikki hevði gjørt íløgur í teldur fyrr enn undanfarna skúlaár, meðan aðrar kommunur vóru farnar undir hesa íløgu fyri 10-15 árum síðan.

Ásbjørn Lómaklett, skúlastjóri, skrivar í síni rættleiðing, at mín pástandur um støðuna í Klaksvík er púra burturvið og beinleiðis ósannindi. Hann skrivar víðari, at skúlin longu í 1978 legði fyri við serligari teldustovu við eini **12-15** teldum, og at hetta talið øktist við árunum. Skúlastjórin spyr so, hvar eg havi fingið mínar upplýsingar í hesum málið, og tað skal eg so svara tær.

Í januar 1998 kom KT-nevnd fólkaskúlans við eini ávegis frágreiðing nevnd ”Kunningartøkni í fólkaskúlanum”. Í hesi frágreiðing eru upplýsingar frá øllum skúlum í Føroyum, har **skúlastjórarnir** svara nøkrum spurnarbløðum um støðuna viðvíkjandi kunningartøkni á teirra skúla. Skúlarnir í Klaksvík hava somuleiðis sent nevndini upplýsingar. Í áðurnevndu frágreiðingini stendur, at fólkaskúlarnir í Klaksvík hava tvær pentium teldur og nýggju 486 teldur, ella tilsamans 11 teldur, harav stendur tann eina á lærarastovuni. Hetta vil siga, at fólkaskúlarnir í Klaksvík høvdu 10 teldur samanlagt til yvir 800 skúlanæmingar, og hetta var støðan heilt fram til seinasta skúlaár. Hesi tøl tala fyri seg. Ásbjørn nevnir í síni rættleiðing, at havast má í huga, at kommunan í Klaksvík var farin undir at fyrireika stórar ábøtur á skúlabygningarnar, og at hetta var orsøkin til, at teir vóru so seinir á veg at gera íløgur í KT. Tað er júst hesum eg royni at ávara ímóti, at kommunurnar vegna manglandi orku/vilja ikki klára at umsita tað íløguna, sum fólkaskúlin er fyri eitt hvørt samfelag.

# Tað trygga beinið verður piðað

**Tummas Eli Høj Joensen**



Føroyski búskapurin stendur á tveimum beinum (fiskivinnu og blokkstuðli). Av hesum báðum, hevur blokkstuðulin víst seg at verið tað tryggara beinið. - Men nú verður hetta beinið piðað.

Herfyri metti ein búskaparfrøðingur, at skulu vit sjálvi finna nýggjar inntøkur ístaðin fyri blokkin, so skulu vit økja um okkara útflutning við 2,4 milliardum krónum árliga. Vit skulu sostatt meira enn tvífalda okkara útflutning, fyri at fáa 1 milliard kr. meira at ráða yvir.

Eg veit ikki, um hetta er heilt rætt. Men tað ljóðar sannlíkt, burtursæð frá, at tað verður trupult at finna rávørur v.m., til eina slíka øking í útflutninginum. Hetta merkir eisini, at vit nú orsakað av ríkisfelagsskapinum liva, sum um vit høvdu ein útflutning uppá 4,4 milliardir og ikki góðar 2 milliardir krónur.

Tey ið komu við uppskotum og festu herróp á blað um niðurskurð av blokkinum, skilda okkum eina ítøkiliga frágreiðing um tær ætlanir, ið liggja fyri framman og sum skulu koma ístaðin fyri tað eina beinið, sum er blokkurin. Tí enn er tunnligt við upplýsiningum um, hvat er í væntu.

### Sjálvberandi búskapur

Vit tosa so nógv um, at føroyski búskapurin skal gerast sjálvberandi. Vit skulu ikki hava ein blokkstuðul á hvørjum ári frá Dønum ! Vit skulu gjalda alt sjálvi við tveimun triðingum av tí peningi, ið er á fíggjarlógini. Tann eina triðingin vilja vit hvørki eiga ella hava nakað við at gera, tí hesin triðingurin er at rokna sum ein olmussugáva frá dønum. Tað verður enntá sagt, at hendan olmussugávan ger tað beinleiðis ómøguligt fyri hvønn einasta føroyska politikkara at stýra við ábyrgd ! Tí, sum teir siga, ein kann ikki stýra við ábyrgd, tá “olmussupeningur “ er uppi í leikinum !

### Leigugjald frá Nato

Røddir hava verið frammi um, at hetta (blokkurin) eru pengar sum Dannmark sparir í verjuútreiðslum og tí fellur tað teimum so lætt, at senda okkum hendan pening !

Grønlendingar siga, at teirra búskapur skal vera sjálvberandi og blokkurin er óneyðugur, tí hesir pengar kunnu ístaðin fáast sum leigugjald frá Nato !? Er hetta eisini hugsanin hjá føroysku loysingarflokkunum? Er fyribrygdi, hjá okkum og Grønlendingum, blokkur, bara galið tí at hesin peningur, um eg so má siga, vendir í Dannmark?

Er tað virkiliga so, at um vit føroyingar loysa frá Dannmark og sleppa av við blokkin, at alt verður bara gott?

Er tað meira føroyskt at fáa pengar frá Nato, enn tað er at fáa pengar úr Danmark?

Hví verður alt sum kemur úr Danmark kallað “olmussa”, meðan tað sum kemur til dømis úr Íslandi er “ein útrætt bróðurhond”?

Nei, lat okkum takað saman lógvatøk, bretta uppum armar og byrja uppá at dagføra okkara skipanir á øllum økjum. Tá nústani vita vit, hvat í krevst av stuðuli til okkara búðskap.

Eg skal enda við, at ynskja øllum lesarunum eitt gott nýggjár.


**Sosialurin**

Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo

**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eitt minstamark av sannleika Ingeborg

**Páll á Reynatúgvu**
*Løgtingsmaður fyri Tjóðveldisflokkin*



**Væl vitandi um at tað populerpolitiskt altíð er býtt av einum politikara at tala at einum fakfelagsleiðara, so kann framførslan hjá Ingeborg Vinther í ÚF nýggjársaftan, ikki fara óátalað aftur við borðinum. Kosta hvat tað kosta vil.**

Nýggjársaftan hevði ÚF eina annars áhugaverda afturlítandi sending. Ymsir framstandandi gestir vóru bodnir á gátt, og valskeiðið sum skjótt er farið, varð mett um, og vigað úr ymsum herðahornum. Og alt gott um tað, sjálvandi roynir hvør einstakur at fáa sína útgávu av veruleikanum upp í ljósið, kanska serliga um tú er politikari. Soleiðis er leikurin nú einaferð.

Ymiskt varð sjálvandi hvat hvør metti varð komið av skafti, men ein var tó sum skaraði burturúr í vantandi innliti, og um ikki tað er nøktandi lýsing, so má Ingeborg Vinther í minsta lagi leggja rygg til at hon fer øgiliga lætt um sannleika, rættleika og veruleika, í hesum føri ið hvussu er.

Havandi í huga hvussu stóran part av føroya fólki Ingeborg Vinther umboðar, so tykist tað ræðandi at hon ger sær so nemmar, avmarkaðar, og í hesum føri rangar fakfelagspolitiskar niðurstøður av førda politikkinum farnu skjótt 4 árini.

Tað eru jú onnur fólk í Føroyum, sum kenna tað sum skyldu at berjast fyri rættindunum hjá okkara verkafólki, og sum gera tað. Eisini innan fyri politisku skipanina, og eg kann prógva at sitandi samgonga millum tjóðveldisflokkin, fólkaflokkin og sjálvstýrisflokkin hevur gjørt stórbroytingar ið betra um samlaðu livikorini hjá verkafólkinum. Eg fari tí her at vísa á tey klípi og varðar, sum onkursvegna vóru ætlaði sum trygd og dygd hjá føroyska verkafólkinum frá sitandi samgongu.

### Dagpeningaskipanin

Sum tað einasta positiva nevndi Ingeborg Vinther nýggju dagpeningaskipanina og tað skal hon hava tøkk fyri. Nýggja dagpeningaskipanin er eitt risaframbrot. Fyri tað fyrsta so loyvir hon verkafólki at vera sjúk eins og øll onnur uttan at vera skerd í løn. Altso teir tveir karensdagarnir eru burtur fyri fyrstu fer yvirhøvur. Fráboðanarskyldan er broytt til tað betra fyri verkafólkið og tíðarskeiðið tú kann vera sjúkrameldaður uttan at detta úr skipanina, er munandi longt, og er nú 10 av 12 mánaðum. Ein broyting ið serliga kemur fólki við lívshóttandi sjúkum tilgóðar.

Lat meg leggja afturat, at nýggja dagpeningaskipanin, sum var ein rein semja millum tjóðveldisflokkin, fólkaflokkin og sjálvstýrisflokkin, er ein munandi betri skipan enn tann sum Ingeborg Vinther, saman við arbeiðsgevarafelagnum skjeyt upp fyri Løgtinginum.

### Barsilsskipanin

Um Ingeborg Vinther ikki hevur lagt merkið til nýggju barsilsskipanina, so eru tað onnur verkafólk sum hava tað. Summi somikið væl at tey í veruleikanum hava fingið meira av løn/pengum í barsilstíðarskeiðnum, enn tey fingu meðan tey vóru í arbeiði. Ein skipan sum tryggjar at føroysk verkafólk fyri fyrstu ferð í søguni, kunnu økja um familjuna uttan at hugsa um lønarniðurskurð av barsilstíðarskeinum.

Ein veruleiki er tað helst at fleiri hava fingið lønarhækking, ella meira enn tey høvdu fingið um tey vóru til arbeiðis. Og tá politiska skipanin royndi at viðgera henda trupulleika og fáa hann rættaðan, tá mintist Ingeborg Vinther knappliga at vit høvdu fingið ein nýggjan barsilsgrunn, tí hon lovaði bál og brand um politiski myndugleikin rættaði skeivleikan. Sostatt fáa, helst fleiri fólk dagin í dag, meiri í løn meðan tey eru í barsilsfarloyvi, enn tá ið tey eru til arbeiðis. Undir øllum umstøðum eitt politiskt framstig verkafólkinum at gagni. Somikið má staðfestast.

### Arbeiðsumhvørvislógin

Samgongan millum Tjóðveldisflokkin, Fólkaflokkin og Sjálvstýrisflokkin hevur eisini sett í verk eina nýggja arbeiðsumhvørvislóg sum greitt broytir maskinmindaða arbeiðsumhvørvið í gomlu lógini, til í dag at tryggja verkafólkið í samlaða arbeiðsumhvørvinum. Eins væl móti sálarligum ágangi, og móti skaðaelvandi maskinum. Eisini eitt greitt framstig verkafólkinum at gagni.

### Pensjónslógin

Væl vitandi um at nógvir pensionistar eru fyrrverandi verkafólk, so er styrkin í nógv útskeldaðu pensiónslógini at teir pensionistar, sum ikki hava aðrar pensiónsskipanir, hóast alt fáa størsta ágóðan av nýggju pensiónsskipanini. Og enn hava verkafólkini hjá Ingeborg Vinther ikki nakra arbeiðsmarknaðarpensión, men tað kunnu hvørki Karl hjá Talis, ella sitandi samgonga lastast fyri.

Ein sannroynd er tað tó at samgongan sær hvussu vánalig pensiónsstøðan er hjá m.a. limunum hjá Ingeborg, og tí roynir samgongan saman við restini av politisku skipanini og føroyska arbeiðsmarknaðinum at finna eina breiða politiska semju um arbeiðsmarknaðarpensiónina, sum kemur at vera øllum føroyska arbeiðsmarknaðinum at gagni. Leggjast skal afturat at tað ikki er nøkur løtt uppgáva.

### Skattalættar

Skattalættarnir hjá sitandi samgongu hava havt sum mál at lætta um skattatrýstið hjá lægru inntøkunum, og hóast 80 mió. kr ikki er øll verðin í hesum samanhangi, so er tað tó saman við hinum betranunum eg havi nevnt omanfyri, enn eitt klípi í verkamannavarðan sum kemur at standa eftir hesa samgongu.

### Hvønn umboðar Ingeborg?

Ingeborg Vinther er sjálv fyrrverandi politikari, so hon veit væl at skal tú fáa nakað av skafti, so mást tú gera politiskar semjur. Eg skal lata vera við at spyrja hvat Ingeborg sjálv fekk frá hondini sum politikari – søgan talar fyri seg, og flestu fólk hugsa eisini sjálvi.

Tí Ingeborg - er einki at ivast í at tú hevur stríðst títt stríð fyri føroyska verkafólkið, men vælsignað ger ikki tað mistak, nú Verkamannafylkingin er farin, at tú leggur teg í fangin á nøkrum ávísum flokki og kastar gor og gall eftir hinum flokkunum. Víst er, at allir flokkar eiga limir í Føroya Arbeiðarafelag, og helst skuldi tað verið rúm fyri øllum flokkum í hugaheiminum hjá leiðsluni í Føroya Arbeiðarafelag.

Eg meti avgjørt ikki at henda samgongan hevur svikið verkafólkið í Føroyum. Heldur tvørturímóti.

At enda kundi verið áhugavert at fingið at vita hvørji mál Ingeborg Vinther og Føroya Arbeiðarafelag hava sett sær í nýggja árinum, og komandi árini. Hvør veit kanska kundu vit hjálpst at fram á leið, heldur enn at berjast um hvat hvør ikki gjørdi nóg væl í tí farna!

Við nýggjárskvøðu.

# Villleiðandi grundgevingar – frá javnaðarmanninum Eyðólvi Dimon

**Jógvan við Keldu**
*løgtingsmaður og fyrrverandi borgarstjóri í Klaksvík*



Tá størri dentur verður ladur á partapolitikk enn rættar upplýsingar, verður boðskapurin ofta - í besta falli – villleiðandi og ósannur.

Tað var ein løgin kensla at sita við, eftir at hava lisið greinina hjá Eyðólvi Dimon - “Skúlin eitt landsmál” - í Sosialinum seinasta leygardag.

Hesin er ímóti at føroyski fólkaskúlin verður lagdur í kommunalar hendur, tí sigur hann: “Lond-ini uttan um okkum fóru fyri fleiri árum síðan undir at leggja uppgávur út til kommunurnar. Men har finnast ongi dømi, sum vísa, at tað er ein fyrimunur at leggja skúlarnar út til kommunurnar.”

Nú veit eg ikki hvørjar kanningar hesin hevur gjørt, eg veit heldur ikki hvussu objektivt hann lesur gjørdar kanningar, men øll vita, at ikki so fáir serfrøðingar hava givið dømi um batar við skúlum, sum eru komnir á kommunalar hendur, eftir ávísar niðurgongdir bæði í námsfrøði og sjálvum rakstrinum so leingi “landið” hevði umsitingarrættin.

Soleiðis, sum viðurskiftini hava verið í Føroyum, her gjaldingarmynstrini hava verið tvey og tríbýtt, verða tað altíð “grá øki”, har hvørgin partur sigur seg at hava ábyrgd. – Tað hevur givið bæði landi og kommunum nógv høvuðbrýggj og stovnum stórar trupulleikar. Umráðandi er, at peningur fylgir við, tá kommunur yvirtaka mál at umsita, sum eitt nú skúlaøkið.

### Eyðólvur má veruliga vita betur

Tá so hugt verður eftir eini av grundgeving Eyðólvs fyri, at tað er lívshættisligt at leggja skúlan reint í kommunalar hendur, vísir hann til dømi, har hann m.a. sigur: “Klaksvíkar kommuna er gott dømi.... so keypti Klaksvíkar Kommuna fyrstu teldurnar til skúlarnar undanfarna skúlaár. Aðrastaðni í landinum høvdu fólkaskúlarnir havt teldur og telduundirvísing í 10-15 ár”.

Víðari sigur hann: “Um næststørsta kommunan í landinum hevur so lítla orku/vilja at røkja skúlan, hvat kann avleiðingin tá ikki gerast í kommunun-um....”

Hetta er beinleiðis ósatt. Henda grundgeving og ákæra er bæði skeiv og grundleys, og hon er upp aftur meiri politisk enn praktisk, men hon verður eisini givin av eirindaleysum javnaðarmanni, fyri at gera álop á eina fólkafloksstýrda kommunu og núsitandi landsstýrissamongu. – Tá er endamálið annað enn at geva rættar upplýsingar.

### Klaksvíkar skúlar teldufrálæru í meiri enn 20 ár

Meira enn 20 ár eru liðin, síðani Klaksvíkar Skúlar fóru at geva teldufrálæru, og tá vóru teldur keyptar. Eisini hevur verið dagført á hesum øki,. annað er so, at fyri tveimum árum síðani, tá ein nýggj skipan varð gjørd, og landskassin rindaði 50% av íløgukostnaðinum, sum eina kompensatión, hetta sum var avtala millum land og kommunur, keypti Klaksvíkar Kommuna eins og flestu aðrar kommunur eisini nakrar teldur, umframt tær ið Klaksvíkar Skúlar høvdu frammanundan.

Um so er, at Javnaðarflokkurin tekur støðu um skúlaverkið undir tílíkum skeivum og villleiðandi upplýsingum, er einki at siga til, at flokkurin er ímóti allari menning á skúlaøkinum við kommunum sum ábyrgdarøki.

Eg fari tí í hesum viðfangi at takka Ásbirni Lómklett skúlastjóra fyri hansara gevandi, skilagóðu og objektivu rætteiðing til Eyðólv Dimon og Javnaðarflokkin.

Tá skriving er meiri politisk enn praktisk, verða upplýsingar í besta falli villleiðandi og ósannar, og lat tað vera sagt her, at hesin javnaðarmaður áður hevur á sama hátt “útmerka” seg í politiskari skriving.